# Bartal fær tveir daga leikbann

Kappingarnevndin hjá FSF hevur givið Bartal Eliasen tveir daga leikbann fyri útspilling. Útsagnirnar, sum dómurin snýr seg um, komu eftir dystin hjá ÍF í Runavík. Tá segði Bartal millum annað, at dómarin dugdi hvørki at floyta ella at renna, og at maðurin við floytuni gjørdi sær fyri skommum á vøllinum. Kappingarnevndin tók málið upp seinasta fríggjadag, og eftir at ÍF hevði gjørt sínar viðmerkingar, varð málið viðgjørt á fundi týs- og mikudagin.



# Tora ikki at tosa

Tá ÍF í gjár fekk úrskurðin um leikbannið hjá Bartali Eliasen, var formaðurin í felagnum alt annað enn fegin. Men hann vildi kortini ikki gera viðmerkingar til tað, sum hann hevði fingið at vita frá FSF. – Eg má siga, sum er, at eg eri fratørur. Men eftir tað, sum nú er hent, so tori eg slettis ikki at gera nakrar viðmerkingar yvirhøvur, sigur Dan Petersen, formaður í ÍF.

# Ein strika í sandin

**Formaðurin í Dómarafelagnum er nøgdur um úrskurðin, sum hann heldur setir eitt mark fyri, hvat tú kanst siga og ikki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Petur Reinert er samdur í, at linjan hjá FSF higar til ikki hevur verið nóg greið, tá um ræður leikbann av disciplinerum ávum. Og í so máta skilir hann væl, um fugufirðingar og Bartal Eliasen harmast um úrskurðin, sum varð gjørdur í gjár. Men hann heldur fyrst og fremst, at tað ræður um at líta fram-eftir.

- Hetta eru jú viðurskifti, sum eru galdandi í øllum londunum kring okkum, og tí er tað upp á tíðina, at hetta verður gjørt hjá okk-um. Tá tú vísir á hini dømini, so er tað sjálvandi óheppið, at avleiðingarnar hava verið ymiskar, men vit hava so valt, at vit vilja ikki legga orkuna í hesi.

- Tað, sum eg haldi vera týdningarmikið, er, at vit við hesum hava sett eina striku í sandin. Nú er tað sligið fast, at tú kanst ikki úttala teg akkurát, sum tær lystir, og eg ivist ikki í, at tað fer at ganga long tíð, áðrenn vit aftur hava eitt líknandi dømi, sigur Petur Reinert.

- Og fyri okkum hevði tað stóran týdning, at hetta fyribrigdið varð kvalt longu í føðingini. Enn eru so bara spældir 5-6 dystir. Tú kanst ímynda tær, hvussu støðan var, um einki varð gjørt, og vit so byrjaðu at taka mál upp, tá 23-24 dystir vóru spældir.

**Eru beinleiðis**

Petur Reinert sigur tó, at hann skilir væl, at ÍF og Bartal Eliasen kenna seg snýttar, nú ein spælari hjá teimum fær tveir daga leikbann fyri nakað, sum ikki hevur kostað áður.

- Lat meg fyrst siga, at hvørki dómarar ella FSF hava nakað sum helst ímóti Bartali ella ÍF. Og fyri teir er tað ógvuliga óheppið, at spælarin verð-ur fangaður beinleiðis við eini slíkari útsøgn. Eg eri vísur í, at var talan um nakað, sum hann hevði úttala seg til ein skrivaðan miðil, so hevði útfallið ikki verið tað sama. Tá hevði hann havt møguleika at tosa við blaðfólki, tá pulsurin var komin nakað niður, soleiðis at útsagnir-nar kundu verið dempaðar nakað. Tann møguleikan hevur tú ikki, tá tú í hitan-um eftir ein dyst skalt beinleiðis í luftina.

- Og lat meg eisini und-irstrika, at hetta ikki snýr seg um, at spælarar ikki kunnu úttala seg um dystir ella døming. Fjølmiðlarnir hava sjálvandi sína upp-gávu at røkja, og eitt hart úttalilsi kann sjálvandi skapa eina góða yvirskrift. Hava dómarar gjørt nakað lort, so er kritikkur sjálv-andi upp á sítt pláss, men tá má gerast sakligt og við eitt sindur av sømiligheit. Og tað er nú heldur ikki altíð, at miðlarnir eru rætta staðið at gera sínar viðmerkingar, sigur Petur Reinert.

# Hetta setir k

**Formaðurin í Kappingarnevndini er sannførdur um, at FSF eigur at tala at og møguliga revsa, tá persónlig álop verða gjørd. Men hann viðgongur treytaleyst, at linjan má vera nógv greiðari, enn hon higar til hevur verið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dømini her á síðuni tala sítt týðiliga mál. Tað hevur verið mest sum tilvildarligt, hvat hevur fingið avleiðing-ar og ikki, tá spælarar og venjarar hava gjørt sínar viðmerkingar til tað, sum hevur gingið fyri seg á vøll-inum. Ikki minst, um orð eru follin um avrikið hjá svartklædda manninum á vøllinum.



*Tað snýr seg ikki um at geva munnkurv. Men spælarar og onnur mugu vita, at vanligur fólkasiður eisini er galdandi, tá tú tosar um dómaraavrik, sigur Sveinur Tróndarson*

**Kann ikki góðtakast**

Sveinur Tróndarson, for-maður í Kappingarnevndini, er eisini skjótur at svara játtandi, tá vit spyrja hann, um hann skilir tey, sum siga, at linjan hjá FSF hevur verið trupul at síggja.

- Avgjørt. Og eg eri kanska eisini ein av teimum, sum sjálvur hava fýlst á hetta. Tí har skal sjálvandi vera ein linja fyri, nær revsing fellur og ikki. Tekur tú tey dømini, sum tú nevnir her á síðuni, so vil eg siga, at tað, sum Ronnie segði í fjør, kanska ikki er so ringt. Tað er meira tekin um ein frustreraðan spælara. Onnur av dømunum eru hinvegin beinleiðis persónlig álop, og tey hvørki kunnu ella eiga vit at góðtaka.

Men fyri ein part eru tey góðtikin fyrr. Eisini hóast FSF longu í mai mánaði í fjør hevur samtykt lógar-grein, har tað verður sagt, at hetta skal fáa avleið-ingar?

- Nú eri eg nýggjur í nevndini, og tí fari eg ikki at siga, hví nøkur ting eru gjørd ella ikki fjør. Tað, sum vit hava gjørt í hesum førinum, er at kanna, hvussu gjørt veður í grannalondum okkara, og har verður slíkt ikki góðtikið.

Men er tað ikki ein keði-lig avgerð, tá reglurnar eru samtyktar í fjør, og tit nú brádliga handlað eftir teim-um, uttan at ein útmelding er komin við t.d. kappingar-byrjan, har dentur verður lagdur á hetta?

- Sum sagt, so kommenteri eg ikki, hví nakað ikki er